# Ov illa útgjørd til ferðavinnu

**Á almennum fundi um ferðavinnu, sum hildin varð í Vágum á páskum, vóru fólk samd um, at vit eru ov illa útgjørt til at taka í móti fremmandum ferðafólki**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Skulu vit gera okkum vónir um at fáa meira burtur úr ferðavinnuni, má landið útbyggjast betri til at taka í móti fremmandafólki. Betri gistingarmøguleikar. Betri møguleikar til at hjálpa sær sjálvum og ikki minst bíligari ferðamøguleikar millum Føroyar og útheimin.

Hesi vóru nøkur av sjónarmiðunum, sum komu fram á fundi um ferðavinnu, sum varð hildin í bygdarskúlanum í Miðvági páskaaftan.

Tað var Felagið Vágar, sum millum annað stendur fyri ferðavinnu í Vágum, sum saman við Kvinnubólkinum í Vágum skipaði fyri fundinum, har eini 30 fólk vóru møtt. Talan var um fólk, sum bæði beinleiðis hava við ferðavinnu at gera, og um onnur áhugað.

Fólk vóru samd um, at tað, vit hava at bjóða ferðafólki, og sum tey eisini í stóran mun koma higar at síggja, er okkara náttúra og tað, sum hon hevur at bjóða.

Men fólk vóru eisini samd um, at umstøðurnar at taka í móti fólki eru ikki nóg góðar. Serliga høvdu fólk á orði væntandi gistingarmøguleikar, og manglandi almenn nátthús, sum nakað, ið bæði fremmandafólk og heimafólkið, ið ferðast í Føroyum, staðiliga saknar.

Leiðarin á Kunningarstovuni í Vágum segði frá, at tey regluliga fáa fyrispurningar frá fólki, sum vilja leiga frítíðarhúsum í Vágum. Men tey mugu í heilt nógvum førum vísa teimum frá sær, tí hús fáast ikki.

– Tað er ikki tí, at húsini ikki eru til. Men heldur tí, at fólk, sum eiga hús standandi tóm, vilja ikki leiga tey út, segði kunningarleiðarin.

Eisini varð víst á, at ferðamøguleikarnir tykjast ov avmarkaðir, nú bara eitt skipafelag og eitt flogfelag flyta fólk millum lond. Fólk vildu halda, at tað hevði ikki bøtt um ferðamøguleikarnar. Tað kom fram á fundinum, at fólk mettu høgu ferðaseðlaprísirnar millum Føroyar og útheimin sum eina beinleiðis forðing fyri føroyskari ferðavinnu.



*Gongurtúrar í Vágum eiga at gerast ein góð inntøkukelda hjá ferðavinnuni í oynni, var niðurstøðan á ferðavinnufundinum í Vágum páskaaftan. Men tá vágafólk vísa fremmandafólki Ritunøvuna, Nýggjaberg, Reipsá ella Kjógvadal, eiga tey sanniliga eisini at duga tað kynstur at taka løn afturfyri*

Mynd : Edvard Joensen

Hóast gistingarmøguleikarnir í Vágum í stóran mun eru avmarkaðir til Hotel Vágar og vallaraheimið á Giljanesi, eru umstøðurnar til at skipa fyri gongutúrum av teimum bestu í Vágum.

Men fleiri vildu á fundinum halda, at føroyingar duga ov illa at fáa burtur úr hesum møguleikum. Vit eru ov lítið professionell, var ein afturvendandi niðurstøða á fundinum. Vit eru so blíð við fremmandafólk, at vit gloyma at taka okkara løn fyri tað arbeiðið og ta tænastu, vit veita teimum.

Hesin hugburður má broytast. Tí skulu vit tosa um ferðavinnu sum alternativ til aðrar vinnur, mugu vit syrgja fyri at fáa pengar burtur úr teimum, sum ferðast í Føroyum. Líka mikið, um talan er um útlendingar ella føroyingar. Har er einki við at gera, staðfesti ferðavinnufundurin í Miðvági páskaaftan.

# Takið sjálv pengarnar

**Skal nakað munandi fáast burtur úr lokalari ferðavinnu, er neyðugt, at pengarnir, sum ferðafólk leggja eftir seg, verða verandi í lokaløkinum**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað er sera umráðandi, at fólkið, sum býr á staðnum, har fremmand ferðafólk vitja, eru við í ferðavinnuni, soleiðis at peningurin, sum fremmandafólkini leggja eftir seg í landinum, verður verandi á staðnum, har hann er brúktur, segði Oda Andreasen, »produktchefur« hjá Stena Line, á ferðavinnufundi í Vágum á páskum.

Oda Andreasen, sum er ættað úr Havn, arbeiðir í dag hjá stóra ferjufelagnum Stena Line, men hevur áður verið ferðavinnustjóri í Løkken í Norðurjyllandi. Tað var við støði í hesum starvi, at hon var biðin um at hugleiða um ferðavmøguleikar í Føroyum við serligum atliti at Vágum.



*Á ferðavinnufundi í Vágum um páskirnar vísti Oda Andereasen, »produktchefur« hjá Stena Line, á tann týdning, tað hevur fyri lokala ferðavinnu, at ferðamðaurin kemur beinleiðis upp á plás og ikki umvegis ov nógvar millumhandlarar. Tað er umráðandi, at lokala ferðavinnan fær fatur á fólki beinleiðis, so peningurin, ið ferðamaðurin brúkar, liggur eftir á staðnum, segði hon*

Mynd: Edvard Joensen

Fyrsta boð hennara var, at skal nakað munagott fáast burtur úr ferðavinnu í Vágum, eins og í øllum slíkum lokaløkjum, er neyðugt, at heimafólkið er við og fær vinningi, heldur enn at ferðaskrivstovur ella incomingfeløg aðrastaðni fara við teimum.

Tað er sera umráðandi, at ferðafólkini koma beinleiðis til teirra, sum skulu liva av lokalu ferðavinnuni. Ov nógv millumlið gera bara ferðina ov dýra, so ov lítið liggur eftir á staðnum. Tí er sera umráðandi hjá lokalu vinnuni, eitt nú eini kunningarstovu, at gera gott lýsingararbeiði, vísti Oda Andreasen á.

Hon vísti sum dømi á allar tær milliónirnar, sum norðurlendsk ferðafólk brúka á Mallorca. Pengarnir fara ikki til Mallorcabúgvar, men til stóru norðurlendsku ferðafeløgini, sum senda hesi fólkini avstað og sjálv skipa fyri øllum, sum gjørt verður á ferðini.

– Skal hetta mynstrið brótast, er neyðugt, at heimafólkið sjálvt aktivt tekur lut í vinnuni, segði Oda Andreasen.

Hon vísti á nakrar møguleikar, ið ein oyggj sum Vágar hevur, men sum hon metti vórðu ov lítið troyttir. Ikki bara her, men í landinum yvirhøvur.

Oda Andreassen vísti á, hvørja styrki hon sá í ferðavinnu í Vágum, eins og hon eisini vísti á nakrar eyðsýniligar veikleikar.

Tað, sum ferðavinnan í Vágum eftir hennara meting eigur at gera nyttu burturúr, er vøkru náttúruni og góðu gongumøguleikunum, ið Vágar hava at bjóða. At fólk halda seg til sum ferðaleiðarar á slíkum túrum, og at tey samstundis leggja seg eftir at brúka ta søgu og tær sagnir, sum knýta seg at oynni. Tað sama er galdandi, tá siglt verður fram við landi við ferðafólki. At duga at siga frá tí, sum fólk síggja.

Men vit eiga at ansa eftir ikki at gerast alt ov staðbundin kortini, vísti hon á. Ikki at smæðast fyri at siga eina søgu ella vísa á eitthvørt, sum finst aðrastaðni í landinum. Tí ferðamaðurin er ikki staðbundin og kennir ikki kommunumørk. So um hann fær eina góða søgu um eitthvørt aðrastaðni í landinum, ger tað bara uppliving hansara tað størri.

Og eisini Oda Andreasen vísti á tann afturvendandi vansan, sum ferðavinnufólk vanliga steðga við. Ov fáar gistingarmøguleikar í oynni. Ov fá matstøð. Og ov fá alment atkomilig wc. Slík sjálvsøgd ting, sum ferðafólk bara taka sum givið, at tey fáa boðin, tá tey vitja eitt fremmant stað.